# Erasmus Montanus og Rolf Guttesen/Virgar Dalsgaard

ALBERT ISFELD



**Tú kanst lumpa alt fólkið eina tíð,**
**og ein part av fólkinum alla tíðina, men tú kanst ikki lumpa alt fólkið alla tíðina.**

*Abraham Lincolm*

**Inngangur**
Tað var einaferð um miðjuna av seinasta árhundrað, at 2 evnaríkir ungir føroyskir studentar fara niður at lesa til tess at vera landinum at gagni og fólkinum fyrimyndir og vitar.

Teir gerast lidnir við sín lesnað, fáa embætisprógv og glíða stillisliga inn í tann danska akademiska heimin.

Meðan teir soleiðis undir og aftaná lesnað ganga á asfaltinum í Keypmannahavn, verða teir brádliga drignir inn í meldurin av ideologiskum hvirlum, sum ídag verður kallað 68 uppreisturin, og sum kann taka sjálvt tann besta av fótum, og hugfarðsliga fáa ung fólk at fara undir nýhugsan og endurskapan av samfelagnum.

Um hesa tíðina er óført at vera mitt í turbulensinum í stórbýnum og vera við í øllum hesum nýggja – vit hugsa um Beatles, Bob Dylan, Rolling Stones og fleiri....... fríheitin er nærmast uttan mørk, og ungdómurin hevur fingið loyvi til at vera til.

Onki er at siga til, at hesir báðir idealistisku og vællisnu ungdómar gerast hugtiknar av tíðarrenslinum og verða knýttir at nýggjum ideologiskum rørslum, ofta við uppruna í tí føroyska umhvørvinum í Keypmannahavn - altso ein diasporarørsla ætlað til at verða fosturlandinum (t.e. Føroyar) at gagni.

Í hesum umhvørvi er hugburðurin sjálvstýri, líkarættur og tað klassaleysa samfelagið.

Men tíðin gongur, og ungdómsins idealisma kann kámast og helst eisini fjarða heilt burtur, og fosturlandið kann til síðst eisini gerast eitt heldur kámt og lítiðsigandi hugtak – ja, kann fyri tann intellektuella gerast ein anakronisma, um so er, at ein ikki er partur av heimaumhvørvinum - í hesum føri Føroyum.

Hvussu var og ikki við hesum báðum okkara studentum er ilt at siga, men vit hava tey nógvu seinastu árini merkt rákan og hugflogið av teimum í føroyskum bløðum – ikki hissini ráki, ikki hissini hugflog.....

Aftaná at hesir okkara ungdómar, sum nú eru í 60unum, og sostatt ikki eru ungdómar longur, og hava verið 40-50 ár í diasporu, kanska eru vorðnir nakað fjarðir, hvat viðvíkir at hava alsk til tað verandi Føroyar, men helst er nærri knýttir einum tanka um tær gomlu Amtsføroyar, er onki at siga til, teir búgva jú ikki her.

**Men!**
Hvussu ber tað til, at hesir báðir við vitskapiligari útbúgving og góðum akademiskum størvum ikki duga at bera teirra boðskap fram í vísindarligum ella seriøsum høpi í føroyskum fjølmiðlum, men framføra púra subjektiv hugarensl um alt tað, sum hevur við føroyskt medvit og samleika at gera?

Orsøkin kann verða, at okkara studentar (Rolf og Virgar) sum onkur hevur framført, hava verið so leingi burtur, at teir av ósketni hava mist alt samband við tær nýggju Føroyar.

**Erasmus Montanus**
Í seinastuni hevur Rolf Guttesen lagt eftir Oddvør Johansen og øðrum, og ákærir tey fyri, í sínum innleggi í bløðunum, ikki at vera nágreinilig og kanska ov lítið vísindarlig, til hetta er at siga at framførslur og prógvførðslurnar hjá studentunum báðum (Rolf og Virgar) eru meinlíkar teimum sum Erasmus Montanus framførir yvirfyri heimafólkinum:

*At vera fullur er gott, tí ein fullur sovnar, tann sum svevur syndar ikki, ergo syndar tann fulli ikki.*

Hetta skal skiljast so, at í heimsmynd Rolf´s og Virgar´s eru bara mistøk, óndskapur og terrorisma hjá tí føroysku sjálvstýrisrørsluni, prógvførðslan er sum tann hjá Erasmus Montanus. Alt tað á sambandsleið er gott.

**Hví!**
Hvussu ber tað til, at í aðrar mátar fornuftigir menn fara so út eftir tangentinum, at teir gerast í øðini, fara í berserkaragongd og kalla føroyskar mótmælisgongur fyri terrorismu, meðan somu mótmælisgongur á Ráðhúsplássinum og uttanfyri Christiansborg eru sunnheitstekin hjá demokratinum. Hvat er munurin her?

Jú munurin her er sum eg dugi at síggja sambart studentunum báðum, at í Føroyum er málið nationalisma – **man merkt die absicht und ist verstimmt**.

Hvat er galið við tí føroysku sjálvstýrisrørsluni (les: Sjálvstýrisflokkinum, Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkinum) - eru teir ikki fólkavaldir?

Og hvat er so gott við sambandsrørsluni (les: Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin) - eru teir ikki eisini fólkavaldir?

**Post scriptum**
Nógv kann verða sagt afturat um ókritisku og einsíðugu skriving studentanna (Rolf´s og Virgar´s), men lat tað fara.

Eg fari ikki at skriva meira hesafer, og eg fari heldur ikki inn í nakað blaðtjak við nakran av nú post-studentunum, tí teir eru, sum Oddvør Johansen sigur, passé – hoyra eini aðrari tíð til.

# Tey gomlu!

SÍMUN MITTÚN

smittun@email.fo

Miðflokkurin er stúrin fyri teim gomlu, nú tey skulu gjalda eitt sindur afturat fyri heimahjálp, ella tá tey fara á eitt sambýli.

Eg haldi nú ikki, tað er grund at vera so stúrin, tí tað er helst tann bólkur í samfelagnum, ið fíggjarliga er fægast fyri.

Tey flestu av teim gomlu sita í útgoldnum húsum og ofta við ikki so lítlum kapitali á bók, ið vanliga bert arvingarnir fáa gleði av!

Jú, summi gomul eru fíggjarliga illa fyri, treyðugt so, men tað er ein annar trupulleiki og skal loysast yvir tað sosiala systemið.

Nei, Jenis, hatta er ein vánalig sak, men populistisk og gevur uttan iva stemmir.

Tit skuldu heldur brúkt tykkara kreftir upp á tað unga og yngra fólkið, sum nýliga hevur sett búgv og kanska tikið búðstaðarlán upp á 1,5 mill. ella meir, tey hava tað tungt fíggjarliga, og tað eiga ikki at vera nógv av teimum, ið hava 4.000 eftir, tá alt er goldið.

# Havnin/verjugarðurin úti í Skúvoy

ALFRED OLSEN

tingmaður fyri Sambandsflokkin



Eg síggi í fjølmiðlunum, at borgarstjórin í Skúvoy, Harry Jensen, boðar frá, at hann nú hevur sent eina skrivliga áheitan til løgtingslimirnar viðv. farmaflutningi til og frá Skúvoy.

“Til stuttleika” sigur hann í somu grein frá hendingini seinasta heyst, tá eg skifti orð við 2 umboð fyri Skúvoy á Tinghúsvegnum, um játtanina til havnina í Skývoy.

Fyri mær var tað ein ráki av álvarsemi yvir samrøðuni vit høvdu saman, tí tað var greitt, at játtanin til havn úti í Skúvoy kom at verða strikað á fíggjarlógini fyri 2010, tí pengar ikki vóru til hesa íløguna.

Í samrøðuni komu vit inn á verjugarðin, og eg fekk at vita, at vandi var fyri at hesin kundi fara, tí í støðum sást hóttafall á honum.

Meðan vit samskifta um, hvat kann gerast og hvør kostnaðurin er fyri at styrkja verjugarðin til bátahylin í Skúvoy, nevni eg, at tey altíð kunnu senda eitt skriv til Rættarnevndina, men borgarstjórin tykist meira upptikin av fótarbeiði mínum, og tað er so hansara val. Tó haldi eg, at hann man vera tann einasti, sum hevur sagt meg missa jørðforbindilsið, tí tey flestu meta meg at hava bæði beinini plantað í so trygt á jørðini.

Eftir at hava kannað, hvørji brøv eru komin til Rættarnevndina, vísir tað seg, at onki bræv er komið til nevndina úr Skúvoy, og tí hevur Harry Jensen heldur onki svarskriv fingið.

Verjugarðurin úti í Skúvoy.

Men samgongan gloymdi ikki Skúvoy, tí á fíggjarlógini fyri 2010, stendur undir konto 15.38.1.14, at hellan undir verjugarðinum til verandi bátahyl er at kalla máað burtur, og at støðan er sera vánalig. Tí verða játtaðar 2,0 mió. kr. í 2010 til ábøtur á verjugarðin til verandi bátahyl.

Eg vóni, at hesar 2 mió. kr. muna nakað til neyðugar ábøtur á verjugarðin í Skúvoy og rokni við, at Harry Jensen og eg eru samdir í tí, “at betur er bøtandi hond enn spillandi tunga”.

Ert tú góður við tíni húsdjór?

So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið




**SPECIAL** (20 kg)

Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Serlig oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum gevur ein blankan og skínandi pels og syrgir fyri at pelsurin ikki gerst turrur. Er tískil eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SPECIAL er eisini sera gott fóður til eldri hundar.

**Fyri posan...... kr. 450,-**

**SØCLA** (20 kg)

Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Inniheldur serliga oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum, ið gev ein blankan og skínandi pels. Er tískil sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SØCLA er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.

**Fyri posan...... kr. 540,-**

**SKYTTENs KAT** (15 kg)

Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur, ið m.a. stimbrar smakkin. Lága PH-virðið fyribyrgir urinsteini (struvitkrystallum). Inniheldur TAURIN, ið er ein aminosýra, ið hevur týdning fyri nethinnuna, hjartamuskulaturin og immunverjuna.

**Fyri posan...... kr. 390,-**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, framleitt í Danmark. Fóðurið inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.

**Bíleggjast kann við at senda t-post til kho@olivant.fo ella við at ringja á tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**